# Nú skulu føroyingar aftur til Føroya

**Fyrri partur av einari størri kanning um, hví føroyingar ikki koma aftur til Føroya eftir lokna útbúgving í Danmark, varð lagdur fram í morgun**

KANNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Sjúrður Skaale tók sæti á fólkatingi fyri Høgna Hoydal/Annitu á Fríðriksmørk, var eitt av hansara avgjørdu málum, at fáa sett í verk eina kanning av, hví føroyingar, sum fara niður til Danmarkar at lesa, ikki koma heim aftur til Føroya eftir loknan lesnað.

Og í morgun varð fyrri partur av tveimum lagdur fram á tíðindafundi í býráðshúsinum í Havn.

Tað eru Høgni Reistrup og Barbara Jacobsen, sum hava staðið fyri kanningini, og tað vóru eisini tey bæði, ið løgdu kanningina fram.



*Høgni Reistrup og Barbara Jacobsen hava gjørt kanningina fyri Norðuratlantiska bólkin á fólkatingi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nógv spennandi, um enn ikki alt nýtt, kom fram í hesari kanningini. Eitt hitt mest markanta, ið kom fram, er, at hugurin at venda heim aftur minkar, tess longri útisetarnir verða varandi í Danmark.

Eitt annað, sum allarhelst mundi taka mong á bóli var, at tað, ið dregur mest niður í Føroyum, er vánaliga veðrið. Tí hóast hetta í sjálvum særneyvanerhøvuðsorsøkin til, at útisetarnir ikki koma heim aftur, so vóru heili 48% sera samd um, at veðrið í Føroyum er ov vánaligt.

Hinvegin halda bara 25% av teimum spurdu, at reglusemið á fogferðsluni hava nakra sum helst ávirkan á val teirra um at koma heim aftur ella ikki.

### Fyrsta stig

Talan er sum nevnt um fyrsta stig í kanningini, og hóast Sjúrður Skaale nú ikki er fólkatingslimur meiri, hevur hann tryggja sær fígging til seinna part av kanningini, sum verður liðugur í heyst.

Fyrri partur av kanningini, sum er prentaður í snøggum bóklingi, vísir millum annað, at føroyski tjóðarsamleikin minkar í mun til árini, útisetarnir verða búgvandi í Danmark. Fyrstu fýra árini kenna 87% av teimum spurdu seg sum føroyingar og bert trý prosent kenna seg sum danir. Hesi tøl broytast soleiðis, at millum teirra, sum hava búð 25 ár ella longri í Danmark, kenna 38% seg sum føroyingar og 27% seg sum danir.

Eitt annað mynstur, sum týðiliga gongur fram av kanningini er, at meðan bert 45% av teimum, sum flyta til Danmarkar í lestrarørindum, koma úr Havnini, ynskja 71% at búseta seg í høvuðsstaðnum, tá tey koma heim aftur.

Kanningin er ógvuliga áhugaverd og informativ, og tað ber sum sagt til at fáa hendur á henni í bóklingaformi.

Í kvøld klokkan 20 verður kjakfundur um evnið í Miðlahúsinum.


## Skráin fyri Rás 2

### Hósdagur 11. sept.

15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartsending – Heri Simonsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir.
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartsending – framhald
17:00 Tíðindi
17:30 Vespureiðrið – Sending um og við NSÍ-fólki. Jonhard og John eru vertir.
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending (e)
21:00 Orð á leiðini – Sending hjá EVR.
21:30 Tónleikur
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 12. sept.

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land
08:05 Bilradio (e)
09:00 Føroyar mítt land
09:05 Morgunsending – Mirjam Pætursdóttir og Eyðfinn Drewsen leggja til rættis
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending – heldur fram
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending – heldur fram
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttur leggur til rættis. Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Hetta vikuskiftið – Røgvi Nybo og Harald í Kálvalíð eru vertir
16:00 Tíðindi
16:05 Hetta vikuskiftið – framhald
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini
22:00 Føroyar mítt land
22:10 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Leygardagur 13. sept.

07:00 Tónleikur
11:00 Vespureiðrið (e)
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Maggi Gunnarsson er vertur
14:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen ella Andrew Djurhuus leggja til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Sunnudagur 14. sept.

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e)
11:00 Tónleikur
11:30 Á Torginum (e) – Absalon Absalonsen er vertur.
13:00 Føroyar mítt land – Sendingar úr vikuni, ið fer. Janus Mohr leggur til rættis
13:40 Tónleikur
14:00 Lýsingar
14:05 Tónleikur
15:00 Lýsingar
15:05 Tónleikur
17:00 3. Hálvleikur – Heri Simonsen er vertur
18:30 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

niels jacob & marjun



## Úr Skjáttuni (e)

– Sunnudagin kl. 10.00

Prát við Niels Jacob Nielsen, trúboðara, sum nú er farin frá fyri aldur, eftir 33 ára tænastu. Niels Jacob og konan Marjun hava verið trúboðarahjún í Brande í Danmark, í Havn, í Fuglafirði og síðstu 10 árini hava tey búð á Strondum. Maja H. Jakobsen leggur sendingina til rættis.

RÁS ...títt radio